## Mary er við barn



So hendi tað. Krúnprinsessa Mary er upp á vegin. Tað var útmeldingin frá danska hoffinum í mánamogunin.

Mary er sett til at eiga seinast í oktober mánaði. Hetta skal henda á Ríkissjúkrahúsinum, verður sagt. Onki er sagt um kyn.

-hkm

## Konsert í miðlahúsinum í gjár



*Konsertin var í sambandi við flaggdagin*

*Mynd: Jan Müller*

Mánadagin klokkan 16:00 var konsert við nýggja bólkinum Fólkayvirlitið í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Meira verður at frætta í næsta blaði.

Jógvan Krosslá:

# – Hetta skapar eina krígsstøðu í Suðuroynni

**Ógvuslig ósemja er framvegis millum suðuroyingar um miðnámsskúlan, sum skal byggjast í Hovi. Suðuroyar Norðara javnaðarfelag kallaði í leygardagin inn til snarfundar, og Ketty Andreasen, forkvinna, sigur at felagið stuðlar landsstýrinum. Jógvan Krosslá sigur hinvegin, at verður miðnámsskúlin bygdur í Hovi, so verður onki tos um samanlegging av kommunum í oynni**

SKÚLADEPILIN
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Aftaná útvarpstíðindini á middegi leygardagin kallaði suðuroyar Norðara javnaðarfelag inn til snarfundar. Útvarpið segði, at ein meiriluti av býráðslimunum á Tvøroyri og í Vági høvdu gjørt eitt tilmæli til landsstýri um at byggja miðnáms- og heilsuskúla í Vági og ellisheim á Tvøroyri, men at býráðslimirnir eru vónsviknir av, at landsstýrið velir eina loysn, sum ein stórur meiriluti av suðuroyingum eru ímóti.

Ætlanin hjá Føroya landsstýri og løgmanni Jóannesi Eidesgaard er at byggja skúladepilin í Hovi. Hesum stuðlar suðuroyar Norðara javnaðarfelag sínum floksformanni í.

– Tað er frægast at hava skúladepilin í Hovi. Fundarfólkið stuðlar landsstýrinum og løgmanni. Skúladepilin skal liggja har, sum landsstýrið heldur tað vera best, sigur Ketty Andreasen, forkvinna í suðuroyar Norðara javnaðarfelag.

– Vit vóna við hesum, at kommunurnar í Suðuroynni allar verða lagdar saman, sigur Ketty Andreasen.

### Onki tos um samanlegging

Men hesum er Jógvan Krosslá, býráðslimur í Vági, ikki samdur í. Hann sigur við Portalin í dag, at tað verður ikki tos um samanlegging, um miðnámsskúlin verður í Hovi.

– Skal man flyta meira úr Vági, so kann mann ikki tosa um samanlegging, sigur Jógvan Krosslá, býráðslimur í Vági.

Men kann Vágs býráð ikki liva við, at skúladepil verður bygdur í Hovi, og at ellisheim verður bygt í Vági, sum skapar fleiri arbeiðspláss í kommununi?

– Ongin kommuna í Suðuroynni hevur tosað um at byggja ellisheim. Eg vænti ikki, at Tvøroyrar býráð fer at gjalda nakað, um ellisheimið verður bygt í Vági. Talan er um einar 9 milliónir, og tað fáa teir onki burturúr, sigur Jógvan Krosslá.

– Avgerðin hjá landsstýrinum er ein bumba. Hetta skapar eina krígsstøðu í Suðuroynni, sigur Jógvan Krosslá, býráðslimur í Vági.

# Væleydnað gospelferð við Norrønu

**Fimm kór og bólkar settu sín serliga dám á Norrønu um vikuskiftið**

SANGFERÐ
*Snorri Brend*

Mánamorgunin kom Norrøna aftur á Havnina av sínum fyrsta gospeltúri.

Frá hóskvøldinum til tíðliga mánamorgunin var alt umborð á skipinum merkt av gospeltónleiki av ymiskum slagi.

Umborð vóru umboð fyri so ymiskar sangstílir sum Kingo-sang, svart gospel, country og vanligan lovsang.

Alt hetta var við til at seta sín serliga dám á vikuskiftið umborð, har nærri 800 ferðafólk fóru úr Føroyum og eini 1000 vóru við á heimleiðini.

Í einum seinni blaði fara vit at greiða nærri frá tí, sum hendi umborð á Norrønu hetta vikuskiftið.




*Sangstílir av ymiskum slagi møttust umborð á Norrønu til fyrsta gospel-túrin av sínum slagi*